

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 05 - 2013

# Grønlendingar kanna arbeiðsmarknað í Føroyum

Síðani eitt stórt føroyskt ferðalag við umboðum frá mynguleikunum og vinnuni vitjaði í Grønlandi í farna mánað, hevur grønlendski áhugin fyri Føroyum verið vaksandi. Afturmeldingarnar, sum føroyingar fingu eftir væleydnaðu vitjanini, hava verið sera jaligar. Ikki minst eru grønlendingar sera áhugaðir at frætta meira um, hvussu føroyskt vinnulív hevur troytt møguleikarnar í kjalarvørrinum á boringum á landgrunninum eins og menningina av eini frálandavinnu. Nú um dagarnar komu fólk frá grønlenska ráðnum fyri vinnu, ráevni og arbeiðsmarknað til Føroya fyri at kunna seg við eitt nú føroysk arbeiðsmarknaðarviðurskifti, her ikki minst um viðurskifti rundan um útlendingar, sum koma til Føroya at arbeiða. Tey hava vitjað hjá Innanríkisráðnum, Útlendingaskrivstovuni og Vinnuhúsinum. Grønland stendur fyri stórum avbjóðingum, nú tað hevur verið frammi, at túsundtals útlendingar, her serstakliga kinverskir arbeiðarar skulu koma til Grønlands at arbeiða í námum har einaferð í framtíðini. Grønlendsku umboðini eru eisini áhugað í at vita, hvussu føroysk vinna hevur troytt møguleikarnar, ið oljuleiting og slíkt virksemi annars hevur havt við sær.

